# Fleiri fólk upp í politikk

**Tjóðveldisflokkurin fer nú undir eitt nýtt tiltak, sum flokkurin rópar Kom og ávirka. Endamálið við tiltakinum er at fáa fleiri fólk at taka lut í politikki og bjóða seg fram, sigur flokkurin**

POLITISKT ARBEIÐI

*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Karsten Hansen, Høgni Hoydal og Heidi Petersen greiddu frá ætlanunum hjá Tjóðveldisflokkinum um at økja um áhugan fyri politiskum arbeiði millum ung og kvinnur. Flokkurin fer at skipa fyri nøkrum evnisdøgum, sum skulu verða eitt slag av politiskari skúling hjá áhugaðum.*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Tað hevur mangan verið ført fram, at áhugin millum fólk fyri at taka lut í politiskum arbeiði er lítil og eingin, serliga millum ung og kvinnur. Hetta ætlar Tjóðveldisflokkurin at gera nakað við, og tí hevur flokkurin í kvittanum at skipa fyri nøkrum evnisdøgum við politiskum arbeiði kring landið.

## Gera seg galdandi

Á tíðindafundi fyrrapartin hósdagin greiddu tríggir av tinglimum Tjóðveldisflokksins, Høgni Hoydal, Karsten Hansen og Heidi Petersen frá ætlanunum hjá flokkinum, sum fara av bakkastokki komandi leygardag.

- Tað er fyrst og fremst væntandi luttøkan hjá fólki í politikki, serliga ungum og kvinnum, sum ger, at vit fara undir hetta tiltak. Vit vilja við hesum gera eina roynd at lata hurðarnar í flokkinum upp fyri øllum, segði Høgni Hoydal á tíðindafundinum.

Skipað verður fyri seks evnisdøgum kring landið, og á hesum verða øll samfelagsøki viðgjørd í tráð við stevnuskrá Tjóðveldisflokksins. Tað verða tó ikki bert fólk úr flokkinum, ið fara at greiða frá á evnisdøgunum, tí flokkurin fer eisini at fáa fakfólk at umrøða tey ymisku samfelagsøkini.

Í sambandi við viðgerðirnar av hesum økjum verða politisku málini hjá Tjóðveldisflokkinum eisini endurskoðað, og tí kunnu luttakararnir á evnisdøgunum eisini verða við til at seta dagskránna hjá flokkinum framyvir, siga umboðini fyri flokkin.

Umframt at viðgera ymisk politisk mál verður í vár eisini skipað fyri skeiði í politiskari framløgu. Í Tjóðveldisflokkinum halda tey, at júst óttin fyri ikki at duga nóg væl at føra seg fram, kann verða ein orsøk til, at summi fólk halda seg aftur við at fara upp í politikk, og tí kann eitt slíkt skeið vónandi bøta um hesa støðu.

## Ein klubbur av gomlum monnum

Eftir seinasta løgtingsval var nógv orðaskifti um kynsbýtið á tingi, og um væntandi áhugin fyri politiskum arbeiði millum tey ungu. Ætlanirnar, sum Tjóðveldisflokkurin nú hevur lagt fram, er ein roynd at taka um endan á hesum orðaskifti og fáa vent gongdini.

- Um vit skulu verða eitt sindur frek, so kann man siga, at eftir seinasta løgtingsval er løgtingið ein klubbur av gomlum monnum, og vit hava brúk fyri fleiri yngri politikarum og fleiri kvinnuligum politikarum, segði Høgni Hoydal.

Heidi Petersen legði afturat, at Útnorðurráðið hevur gjørt eina samtykt, sum heitir á tingini um at virka fyri, at kvinnur fáa ein øktan leiklut í politikki. Tó heldur løgtingskvinnan ikki, at ábyrgdin ikki bert liggur hjá tinginum og landsstýrismanninum, men tað er eisini upp til teir einstøku politisku flokkarnar um at handla, og tað er so tað, sum Tjóðveldisflokkurin ger nú, segði Heidi Petersen.

Fyrsti evnisdagurin hjá Tjóðveldisflokkinum verður í Vágum leygardagin, og tá verða evnini "einar rættvísari Føroyar" og "einar tryggari Føroyar".

# 20 hárfríðkur á skeiði

Fyri nøkrum vikum síðani vóru tær báðar, Karin Sólsker og Vera Larsen, á skeiði hjá Vidal Sassoon í London.

Endamálið við skeiðnum var sjálvandi fyrst og fremst at finna íblástur til sín sjálvs, men hartil høvdu tær eisini í hyggju, at nýggja vitanin og nýggi íblásturin møguliga eisini kundi vera grundarlagið undir einum skeiði fyri føroyskum hárfríðkum.

Og hetta skeiðið varð so hildið í hølunum hjá Karin'sa í Havn leygardagin. Hetta er fyrsta ferðin, at tær báðar hava roynt at havt skeið av hesum slag, og sjálvar vóru tær fegnar um undirtøkuna, sum hetta hevði fingið. Einar 20 frisørar úr øllum landinum høvdu teknað seg til, og bæði leygar- og sunnudagin kundu hesar so nema sær nakrar av teimum royndunum, sum vóru komnar burtur úr ferðini til London.

- Sjálvandi er talan ikki um ein fullkomnar endurtøku av tí, sum vit upplivdu í London. Til tess var tað skeðið alt ov rúgvusmikið, heldur Karin Sólsker, tá vit spurdu hana, hvussu tær skipaðu skeiðið.



*Saksarnir gingu títtir, tá Karin Sólsker og Vera Larsen høvdu skipað fyri skeiði um heyst- og vetrarmótan seinasta vikuskifti*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

- Hinvegin er tað so, at vit hava valt teir partarnir, sum vit hava hildið hava største týdningin út, og síðani hava vit so roynt at givið nakrar av teimum royndunum víðari.

Skeiðið varð skipað á tann hátt, at leygardagin var talan um eitt slag av mótasýning, har Vera og Karin høvdu gjørt nakrar modellir klárar, og síðani varð tosað um teknikkir, heystmótan v.m. Sunnudagin royndu skeiðluttakararnir seg so sjálvar við saksi og liting, soleiðis at eisini tær kundu royna seg við nýggja mótanum. Ein móti, sum í vetur fer at innihalda eitt sindur av hvørjum. Asymmetriskar klippingar við beinum linjum verður nakað av tí, sum kemur at síggjast, og hartil verður eisini loyvt at blanda litirnar nakað. Fyri tað mesta, verður talan kanska um kaldar litir, men eisini blandingar við heitum litum fara at standa á skránni, og eitt nú verður nokk ikki óvanligt við hársniðum, har violett og appelsinlitt verða blandað saman í strípunum.

Hetta er fyrsta ferðin, at salongin hjá Karin verður nýtt til skeið av hesum slag, og sjálv læt hon sera væl at, tá vit spurdu hana, hvussu hetta hevði spælt av. Hølini eru eisini hóskiliga stór í so máta, og ikki færri enn 10 stólar eru tøkir. So á tann hátt skuldu bara tvey umfør til, áðrenn skeiðsluttakararnir høvdu klipt hvør sínum modelli.

**-mørk**


Hi-Fi

Stórt úrval av flatskermum

damor

LG 42PX4




Viewpia LC-32IE11




Eitt 32" LCD-Sjónvarp har tú fært nógv fyri pengarnar. Tað hevur eina uppleysn uppá 1366 x 768, og við DVI inngangi er tað klárt til HDTV. Innbygdir eru tveir Tunarar og hátalaraeffektin er 2x15Watt.

Viewpia LC-26IE11




Ein 26" LCD-Sjónvarp har tú fært nógv fyri pengarnar. Tað hevur eina uppleysn uppá 1366 x 768, og við DVI inngangi er tað klárt til HDTV.

Harman Kardon Surround Sett




Pakkatilboð við surroundljóð í top-góðsku. Surroundforsterkari 5x40W við innbygdum radio. DVD avspælari við pixelstýring og MP3 avspælara. 5 Surround hátalarar og subwoofer

Á HJALLA · 188 HOYVÍK
TEL 315415 · FAX 319001
damor